Landshetja ella quislingur?

Eftir seinna veraldarbardaga varð Knut Hamsun stevndur inn fyri ein krígsrætt, men var fríkendur vegna heilsubrek. Tað er møguliga ov lætt at avskriva allar bøkurnar hjá Hamsun, tí hann á gamansaldri var nazi-sympatisørur. Men tað er ringt at lata vera. Kortini haldi eg ikki, at bøkur hansara vera brá av at hava víðgongd sjónarmið, skrivar Bárður Olsen

Hamsun til vinstru í myndini

MENTAN
Bárður Olsen

Knut Hamsun, sum varð føddur 4. august 1859, er ein tann størsti rithøvundurin, ið norðurlond hava fostrað. Hann gav sína fyrstu bók út 18 ára gamal og skrivaði, til hann doyði av elli. Hann var sera vældámdur í Noregi. Ein sonn landshetja. Nobel-virðisløninа í bókmentum fekk hann í 1917 fyri bókina "Markens Grøde". Um Nobel-virðislønir vórðu givnar í 1890, hevði hann uttan iva fingið hana tá fyri bókina "Sult". Hann skrivaði ótrúliga nógv. Eftir hann liggja ikki minni enn 24 skaldsøgur, eitt yrkingasavn og ein sjónleikur. Gyldendal Norsk Forlag hevur givið øll verkini hjá Hamsun út. Hann skal sjálvandi lesast á upprunamálinum. Hann var verandi landshetja, til hann varð stemplaður sum landasvíkjari.

Sult

Hansara besta bók eitur "Sult". Hon er ótrúliga genial. Longu tá ein letur bókina upp og lesur til fyrsta reglubrotið, sæst, at bókin er nakað heilt serligt. "Det var i den tid, jeg gik rundt og sulted i Kristiania, denne forunderlige by, som ingen forlader, før han har faaet mærker af den...".

Bókin er grundað á ta tíðina, tá Hamsun búði í Kristiania, núverandi Oslo. Hann er altso ikki í Christiania, við einari joint í munnklovanum. Hann livdi av at skriva blaðgreinar, men tað hendi seg ofta, at einki blað vildi hava greinarnar, tessvegna mátti hann hungra. Bókin er ein góð lýsing av, hvat gongur fyri seg í heilanum, tá ein hungrar. Vit og skil koma í aðru rað í mun til eina matartuggu. Serliga minniligt er, tá hann púra vitleysur gongur aftan á einari damu, ið hann hevur fingið hug á. Hann hevur ikki etið í fleiri dagar. Heilin virkar als ikki, sum hann skal. So møtast tey bæði, tað einasta hann ger er, at rópa: Ylayali!"

Knut Hamsun byrjaði at skriva bókina, ávegis millum Keypmannahavn og Amerika. Hann hevur helst havt góða tíð at skriva umborð á dampskipinum. Bókin líkist nógv einari ævisogu, hon er skrivað á tann hátt, men hetta er ein skaldsøga.

Pan

Bókin "Pan" er næstan líka góð sum Sult. Navnið Pan kemur frá skógarguðinum Pan. Hon er um Einabúgvan Thomas Glahn. Hann fæst við at fiska og ganga á veiðu. Tann einasti, ið hann er saman við, er hundurin Æsop. Síðani broytist livið hjá honum, tá hann møtir dóttrini hjá stórkeypmanninum, ið eitur Edvarda. Tá má hann tilpassast tí vanliga samfelagnum. Henni dámar ikki, at hann gongur á veiði. Men Thomas er ikki Pan uttan grund. Eina staðni í bókini sigur hann: "Jeg levet i skogen, jeg var skogens søn". Í fyrstuni gongur væl. Síðan føler hann, at Edvarda spælir hund við sær. Hann dugir ikki fólkaskikk. Thomas veit, at hon er góð við hundin. Í hevndarhuga gevur hann Æsop eina kúlu fyri pannuna. Síðan biður hann ein mann bera líkið av hundinum til Edvardu. Tað endar við, at hann flýggjar úr landinum. Hann vil til Afrika ella India, bara burtur. Á bryggjuni takkar Edvarda fyri gávuna. Okkurt skal hon jú siga. Hann endar sínar dagar í indiskum frumskógi. Har føler hann seg heima. Fyrri partur av bókini endar á henda hátt: "For jeg hører skogen og ensomheden til". Hamsun hevur skrivað nógvar sera góðar bøkur. Viðmælast kunnu t.d "Victoria" og "Sværmere". Hesar bøkurnar lýsa sera væl, hvussu tað var á bygd í Noreg fyri meira enn 100 árum síðan.

Prosessen mot Hamsun.

Ein filmur er gjørdur um síðstu tíðina hjá Hamsun. Bygdur á bókina "Prosessen mot Hamsun" hjá Thorkild Hansen. Eg las bøkurnar hjá Hamsun, áðrenn eg visti, at hann tók undir við nazistunum. At hava verið nazisympatisørur, tá Noreg var hersett av týskarum, má sigast at vera sera áheppið. Hetta hevur oyðiligt sera nógv fyri Hamsun. Hansara eftirmæli er rættiliga vánaligt. Hamsun vitjaði Adolf Hitler, mest fyri at tosa Noregs søk. Hitler segði seg vera hugtiknan av Hamsun. Hamsun meinti, at týskararnir uppførdu seg so illa í Noregi. Hitler østi seg upp. Tá teir høvdu tosað saman eina løtu, bað Hitler sínar menn fara burtur við Hamsun. Hitler gjørdist rættiliga skelkaður, tí Hamsun bar seg so merkiliga at.

Tá Hitler tók lívið av sær í 1945, skrivaði Hamsun minningarorð. Eftir seinna veraldarbardaga varð Hamsun stevndur inn fyri ein krígsrætt, men var fríkendur vegna heilsubrek. Hóast tað, fekk hann eina bót, áljóðandi 325.000 kr. Tey kundu jú ikki drepa hann, á sama hátt sum Vidkum Quisling var dripin. Hann var eisini innlagdur á sinnissjúkrahús, hóast at hann ikki var sinnissjúkur. Har vístu teir honum ein film, ið var upptikin í einari konsentrationslegu. Tað endar við, at gamli patriarkurin Hamsun, situr og grætur.

Í 1949 skrivaði hann bókina: "Paa gjengrodde stier". Her roynir hann at forklára sínar meiningar og gerðir undir krígnum. Hetta er síðsta bókin hjá Hamsun. Hon var partvís skrivað á sinnissjúkrahúsinum. 72 ár vóru millum ta fyrstu og seinasti bókina.

Eftirmæli

Tað er møguliga ov lætt at avskriva allar bøkurnar hjá Hamsun, tí hann á gamansaldri var nazi-sympatisørur. Men tað er ringt at lata vera. Á ungum aldri var Hamsun tvær ferðir í Amerika. Honum dámdi sera illa landið. Um hann veruliga var nazistur, er ringt at meta um, men honum dámdi ikki demokrati. Hann var týsklandsvinur um ein háls, longu áðrenn Hitler kom til valdið í 1933. Bøkurnar, ið eg havi lisið hjá Hamsun, bera ikki brá av hansara víðgongdu sjónarmiðum. Tað ber til at venda tí á høvdið. Fleiri rithøvundar hava verið kommunistar og hava sympatiserað við t.d Stalin ella Pol Pot. Eingin hevur sagt nakað ringt um tað. Tað er eitt sindur dupultmoralskt at traðka ov hart á Hamsun. Munurin á kommunismu og nazismu var ikki so ógvuliga stórur.

Tað verður ofta tosað um "Famous last words" hjá kendum fólkum. Seinastu orðini hjá Hamsun vóru: "Lad det vere, Marie, jeg dør nu". Hetta segði hann við konuna, tá hon rættaði uppá pútuna hjá honum. Hamsun doyði í 1952 92 ára gamal.

Adolf Hitler.

Jeg er ikke verdig til at tale hørredet om Adolf Hitler, og til nogen sentimental Børeise indbyder hans Liv og Gjerning ikke.

Han var en Kriger, en Kriger for Menneskeheden og en Forkynder av Evangeliet om Ret for alle Nasjoner. Han var en reformatorisk Skikkelse av høieste Rang, og hans historiske Skjebne var den, at han virket i en Tid av den eksempelløseste Raahet, som tilslut fældte ham.

Slik tør den almindelige Vesteuropæer se paa Adolf Hitler. Og vi, hans nære Tilhengere, bøier nu vaare Hoder ved hans Død.

Knut Hamsun

Minningarorð, sum Hamsun skrivaði um Hitler

– Vit foreldur verða góð við tey, ið eru góð við okkara børn, og eyka sterkt er hetta, tá ið góðskan verður víst okkara barni, sum er menningartarnað

Tað er eisini lívsvirði í brendum pylsum og hálvráum búffum

– Tíðina, eg havi brúkt til at rudda og vaska, stendur ikki í minninum, sum nakað , ið hevur givið mær lívsvirði. Hinvegin gevur tað lívsvirði at taka sær tíð til at vera saman við teimum, sum vit eru góð við, sigur Malena Arnholdsdóttir, sum er næstformaður í Javna og mamma ein menningartarnaðan drong

LÍVSVIRÐI
Áki Bertholdsen

– Tá ið tú gleðir onkran annan, verður tú glaður sjálvur. Tú fært tað, tú gevur og oftast við rentu.

Hetta kann setast sum ein stutt yvirskrift yvir tað grundarlag, sum Malena Arnholdsdóttir á Skála, heldur, at vit eiga at byggja lív okkara á. Í Sosialinum seinasta leygardag segði hon okkum, hvat tað er, sum gevur lívinum innihald og sum økir um lívsvirði. Tá greiddi hon frá, at tað ofta er tað mest lítisvirda, sum gevur lívsvirði. Hon tosaði um týdningin av at hava góða familju, av at sleppa í urtagaðin at grava, av at fáa eitt postkort, ella bara tað at sleppa at loysa frá posabandinum viðhvørt. Men hon hevur meiri upp á hjartað enn tað, sum rúmd varð til í Sosialinum seinast og tí lata vit hana aftur sleppa til orðanna í dag. Og í dag heldur hon fram í sama anda, at tað ofta er tað, sum er lítið og ókeypis, ið gevur okkum størstu gleðirnar.

Malena Arnholdsdóttir eigur fýra børn. Yngsta barnið er 17 ára gamli Ólavur, sum er menningartarnaður og tí hevur hon ofta lyndi til at máta síni egnu lívsvirði út frá hansara fortreytum.

Vísa virðing og ábyrgd

Malena Arnholdsdóttir sigur, at tú hevur virði, tá fólk minnast teg og vísa tær virðing og ábyrgd.

– Føðingardagurin hevur stóran týdning fyri Ólav og tað er gott at familjan kemur. Men hann vil eisini fegin, at onkur vinur skal koma í føðingardag.

– Seinast hann fylti, komu øll møgulig í familjuni í føðingardag, men at Tróndur, ein granni, sum er javngamal við hann, eisini kom, bjargaði degnum hjá okkum øllum.

Hon heldur, at yvirhøvur hugsa menningartarnað nógv um føðingardagin.

– Kanska er tað so, at vit øll gera tað, men at vit ikki vilja viðurkenna tað?

Hon sigur, at tað var ein gleði hjá henni at fáa gestir. Og Ólavur elskar, tá ið tey fáa gestir, og tá ið tey fara at vitja onnur.

– Tað er gott at hava góðar grannar. Vit kunnu støkka inn á gólvið hjá hvørjum øðrum. Okkara grannar hava altíð tikið væl ímóti Ólavi og tey hava tikið tey eldru børnini við í bilin, tá ið tey hava koyrt síni egnu børn í skúla og hjálpt okkum, tá á hevur staðið, havt Flikku, tá vit hava verið innløgd o.s.v. Flikka er tíkin hjá Ólavi og hevur stórt lívsvirði fyri hann.

– Vit foreldur verða góð við tey, ið eru góð við okkara børn, og eyka sterkt er hetta, tá ið góðskan verður víst okkara barni, sum er menningartarnað.

– At fólk vísa mær og børnum mínum virðing gleðir meg eisini. Sum dømi kann eg nevna einaferð eg var hjá lækna við Ólavi, og læknin bað Ólav sjálvan skriva undir uppá roknningina.

– Eg varð so glað fyri hetta, og Ólavur var errin, tí tað dugir tað. Hetta tykist kanska sjálvsagt, men verður ikki gjørt so ofta.

Øll vaksa við ábyrgd

Malena Arnholdsdottir dámar onki, tá ið Ólavur uppførir seg býtt, og fólk so bara siga at tað ger einki, tí hann er so fittur.

– Eg haldi eisini at hann er fittur, men tað ger, at hann uppførir seg býtt, tí hann veit betur. Vit skulu heldur royna læra tey menningartarnaðu og geva teimum ábyrgd. Tú hevur virði, tá ið tú fært ábyrgd.

– Tað hevur eisini týdning, at vit eru erlig. Tey, tú ert góð við, ert tú erlig við, men tað er ikki altíð, ein skal vera bersøgin og siga tað, ein hevur hug til. Lat okkum heldur siga tað góða, geva hvørjum øðrum eitt herðaklapp og eitt smíl, tí tað gevur lívsvirði. Hyggja vit eftir tí góða, síggja vit tað. Tú finnur tað, tú leitar eftir.

Tað er eisini lívsvirði fyri Malenu at vita, at onnur hava tikið sær av Ólavi, og givið honum onnur upplivilsi, meðan hon hevur verið til arbeiðis ella saman við hinum børnunum.

– Tá ið eitt barn við breki er í húsinum, er so skjótt, at tað kemur at fylla ov nógv. Tí er tað av størsta týdningi at fáa umlætting, so foreldrini eisini hava tíð at vera foreldur hjá teim frísku børnunum.

– Tvey tey seinastu árini hevur Ólavur av og á verið til umlætting í Klaksvík og í Havn. Tað hevur verið gott fyri meg og hóast hann sigur nei at fara, plagar tað at ganga kortini, tá hann fyrst er komin. Men best dámar honum at sleppa út til abba og ommu. Tey hava serliga gott tak á honum.

Skúla fyri øll - næstan

Vit hava ein skúla fyri øll – ella næstan øll.

– Tað er stórt lívsvirði í, at vit øll kunnu ganga í skúla og fáa tann lærdóm, sum vit ynskja okkum, uttan at gjalda fyri tað.

Øll børnini hjá Malenu hava hava gingið í barnaskúla á Skála, eisini Ólavur. So fór Ólavur inn á Strendur, sum børn av Skála gera í eldru flokkunum, og tað bar so dánt til ta fyrstu tíðina, men enn er framhaldsskúlin ikki til reiðar til tann menningartarnaða.

Hon hevði viljað, at tað var ein eftirskúli til menningartarnað. Tað hevði givið fleiri menningartarnaðum og foreldrum teirra lívsvirði.

– Men tað er eisini stórt lívsvirði í at hava arbeiði og at kunna arbeiði.

Sjálv er hon sjúkrasystir á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi, men í løtuni er hon í farloyvi.

– Mær dámar væl. Arbeiði er status, tú ert nakað og gert nakað, tú hevur arbeiðsfelagar og tað, at eg arbeiði við fólki er eyka gott fyri meg.

Hon vónar, at eisini Ólavur og øll tey menningartarnaðu kunnu fáa eitt arbeiði, sum tey makta, tí tað gevur teimum lívsvirði.

Brendar pylsur og hálvráir búffar

Malena Arnholdsdóttir hevur ta áskoðan, at fyri at kunna gleðast um at hava frí, mást tú hava arbeiði ella okkurt sum ikki er frítíð. Tí hesi bæði eru tengd at hvørjum øðrum.

– Á sama hátt, sum eg gleðist um arbeiði, gleðist eg um frítíðina, tí tá er gott at slappa av, gera tað tú vilt og føla, at tú hevur frí. Men tað hevur eisini stóran týdning at taka sær tíð til at hugna sær við sínum kæru.

– Vit hava ofta so nógv at gera, sum vit halda er alneyðugt, og tíðin og lívið rennur avstað.

Hon minnist einaferð, børnini og hon fóru til Leynavatn við tjaldi.

– Vit høvdu grill við og grillaðu pylsur og búffar. Sum eg minnist, brendust pylsurnar og búffarnir vóru hálvráir, men tey ótu og vóru vælnøgd. Og tað undarliga er, at í minninum á

Framhald á síðu 8